UTTAN ÚR HEIMI

## Maersk Air fer aðrar leiðir

Leiðslan í danska flogfelagnum Maersk Air fer í dag at almannakunngera, at felagið fer undir eitt stórt átak, sum skal hjálpa tí illa stadda felagnum.

Sambært donskum bløðum fer Maersk Air undir fleiri nýggjar rutur til lond í Suðurevropa, samstundis sum prísurin á í hvussu er summum ferðaseðlum verður væl lægri enn vanligt. Maersk Air hevur tvær ferðir fingið 700 milliónir krónur frá móðurfelagnum A.P. Møller, men við teimum nýggju tiltøkunum roknar leiðslan við, at felagið sleppur burtur úr teimum fíggjarligu trupulleikunum, sum tað hevur drigist við. Kortini verður roknað við, at felagið fer at hava einar 500 milliónir krónur í halli í ár.

Lítið og einki er likið út um tær nýggju ætlaninar. Eitt nú hevur Maersk Air boðað Kastrup-floghavnini frá, at felagið fer at hava fleiri fráferðir um stutta tíð, men floghavnin hevur ikki fingið at vita, hvagar flogførini skulu flúgva. Hildið verður kortini, at talan í høvuðsheitum verður um ferðir til Fraklands og Spania.

## Krevja svar

Norska uttanríkisráðið vil nú hava eina frágreiðing frá amerikonsku myndugleikunum, eftir at tað er komið fram, at amerikanski herurin hevur nýtt norskar patrónir av slagnum MK 211 ímóti fólki.

Talsmaðurin hjá uttanríkisráðnum í Oslo, Karsten Klepsvik, sigur við NTB, at patrónirnar eru ætlaðar ímóti hernaðarakførum og ikki ímóti. Men sambært mannarættindafelagsskapum í Irak hava hermenninir nýtt tær ímóti fólki har. Sum skilst halda amerikanararnir ikki, at teir hava gjørt nakað skeivt, tí eftir teirra tykki kunnu patrónirnar eisini nýtast ímóti fólki.

Tveir politiskir flokkar í Noregi krevja nú, at norðmenn skulu gevast við at útflyta patrónir av hesum slagnum, til tær eru kannaðar nærri.

## Hann stillar uppaftur

Tann umstríddi borgarstjórin í London, Ken Livingstone, stillar uppaftur til borgarstjóravalið, sum verður tann 10. juni.

Tann 58 ára gamli borgarstjórin, sum ofta verður róptur "Reyði Ken", varð valdur til borgarstjóra í enska høvuðsstaðnum í 2000. Frammanundan hevði hann verið limur í leiðsluni í flokkinum Labour, men fekk sekkin, tá hann gjørdi av at stilla upp sum óheft valevni ímóti valevninum hjá Labour. Í desember í fjør eydnaðist tað Ken Livingstone at fáa limaskapin í Labour aftur, og mánakvøldið atkvøddu meiri enn 93 prosent av teimum 40.000 flokslimunum í London fyri honum sum valevni í summar.

Ken Livingstone fekk nógvar ákoyringar, tá hann gjørdi av, at fólk, sum koyra bil í miðbýnum í London yrkadagar, skulu gjalda 50 krónur í avgjaldi. Men avgerðin hevur víst seg at virka sera væl, tí ferðslutrupulleikarnir hava verið munandi minni síðani.

## Tikin fyri aðru ferð

Mánadagin tók norska sjóverjuskipið "Tromsø" russiska trolaran "Kapitan Gromtsev" uttan fyri Troms, tí skiparin hevði ikki skrivað rættar upplýsingar í veiðidagbókina.

Sjóverjuskipið kom fram á trolaran sunnukvøldið og setti menn umborð at kanna, um alt var, sum tað átti at vera. Eftirlitsmenninir komu eftir, at skiparin hevði skrivað góð 22 tons minni av toski í dagbókina, enn skipið hevði fiskað. Tí fekk russiski trolarin boð um at fylgja við sjóverjuskipinum inn til Tromsø.

Hetta er aðru ferð, at "Kapitan Gromtsev" er tikin fyri brot á norsku veiðireglurnar. Fyrru ferð var í mei í 2002, tá trolarin fiskaði á einari stongdari leið sunnan fyri Bjarnoynna.

# Stór íbúðarhús rapaðu



*Her verður ein kvinna bjargað úr leivdunum av íbúðarhúsunum í Konya*

**Fleiri fólk doyðu, tá eini íbúðarhús í turkiska býnum Konya rapaðu fyrrakvøldið.**

BYGGIFUSK
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Á middegi í gjár hvødu bjargingarliðini funnið ellivu deyð aftan á vanlukkuna í Konya, sum er miðskeiðis í Turkalandi. Umleið 30 onnur vórðu flutt á sjúkrahús, og níggju vóru ikki komin afturíaftur.

Íbúðarhúsini vóru í fleiri hæddum. Har vóru 36 íbúðir, og hildið verður, at umleið 120 fólk vóru í húsunum, tá tey rapaðu.

Hetta er ikki tann fyrsta vanlukkan av hesum slagnum í Turkalandi. So seint sum leyggardagin doyðu seks fólk, tá eini hús í Istanbul brádliga rapaðu, og seinasta summar douðu níggju studentar, tá ein skúli rapaði.

Í teimum flestu førunum hevur tað víst seg, at húsini hava verið alt ov illa gjørd, og at byggiharrarnir hava als ikki hildið tær ásettu byggireglurnar.

# Stúra fyri eiturálopi á ferðamannaflogfør

**Seinastu tíðina eru fleiri flogferðir ímillum Evropa og USA avlýstar. Orsøkin er, at myndugleikarnir stúra fyri, at al-Qaeda ætlar at nýta lívfrøðilig ella evnafrøðilig umborð á flogførum**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Washington Post sigur seg hava fingið at vita frá fregnartænastukeldum, at flogrænarar ætla at nýta eitt evnafrøðiligt evni, sum kann doyva bæði ferðafólk og manning, og at teir síðani skulu ræna flogfarið og nýta tað til álop eins og tann 11. september í 2001.

Sambært blaðnum hava amerikonsku fregnartænasturnar eisini upplýsingar um, at al-Qaeda hevur ætlanir um at spræna eitt koppa- ella miltbrandvirus inni í einum flogfari, soleiðis at ferðafólkini eru lívshættisligir smittuberar, tá tey fara úr flogfarinum. Washington Post skrivar, at tað ber væl til at sleppa umborð á flogfør við slíkum evnum, uttan at eftirlitið kann avdúka tað.

Tí hava British Airways, Air France og tað amerikanska Continental Airlines mavlýst fleiri ferðir teir seinastu dagarnar, skrivar blaðið. Í evropeiskum fjølmiðlum hava avlýsingarnar ikki fingið stórvegis umrøðu, men teir amerikonsku fjølmiðlarnir hava gjørt nógv burtur úr teimum.

Washington Post veit eisini at siga frá fregnartænastukeldum, at yvirgangsmenn kunnu fara at royna at smugla eina kjarnorkubumbu yvir um Atlantshavið til USA, men hetta verður tó ikki hildið vera serliga sannlíkt.

Seinasta sunnudag avlýsti Continental Airlines eisini eina innanríkisferð ímillum Washington og Houston, og ein talskvinna hjá innanríkisráðnum váttaði seinni, at ferðin var avlýst orsakað av vandanum fyri yvirgangi ímóti flogfarinum.

ítróttur

Nr. 23 • mikudagur • 4. februar 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# Gult gólv og stórskíggi



*Aftur í ár verður Ítróttarhøllin á Hálsi broytt til sanna flogbóltshøll, tá steypafinalurnar eru á skránni annað vikuskiftið*

**Mánadagin kom gólvið, sum Flogbóltssambandi hevur leigað til steypafinalurnar leygardagin 14. februar til landið**

FLOGBÓLTUR
*tíðindaskriv*

Gólvið var eisini her seinasta ár, og er eitt serligt flogbóltsgólv, sum bert verður nýtt henda eina dagin í høllini á Nabb. Hesi gólvini verða eisini nevnd Taraflex-gólv, og verða nýtt í øllum stórum altjóða kappingum.

Í finaludystunum verður sjálvur vøllurin orangelittur, og alt umráðið runt vøllin verður grønt. Á henda hátt slepst undan øllum óneyðugum strikum og linjum v.m., sum eru til ampa fyri leikarar, dómarar og áskoðarar.

Eitt slíkt gólv er dýrt at keypa, og tá fyrstu finalurnar vóru leiktar fyri 4 árum síðani, var tað eitt av tíðindafólkunum sum spurdi, nær ætlanina var at leika á tílíkum gólvi. Flogbóltssambandi hevur kannað kostnaðin av tílíkum gólvi, og liggur hesin kostnaður um kr. 250.000 fyri eitt nýtt gólv.

Aftur í ár er tað so við vælvild frá Dansk Volleyball Forbund, at gólvið er í Føroyum, tí leigusáttmáli er skrivaður til bert hesar báðar dystirnar. Í sambandi við at gólvið verður lagt á í høllini fríggjakvøldið, kemur ein dani at hjálpa til við hesum, soleiðis at alt verður gjørt á rættan hátt.

– Gólvið royndist sera væl seinasta ár, og høllin tók seg sera væl út henda dagin - tað var sum ein nýggj høll. Ljósið í høllini var nógv betri enn vanligt, og gólvið tók seg sera væl út í høllini, sigur Niclas Joensen, formaður í Flogbótlssambandi Føroya.

– Lýsingarnar runt vøllin koma eisini nógv betri til sín rætt, og sostatt koma tær at síggjast betri, sigur Niclas at enda.

### Stórskíggi aftur í ár

Aftur í ár verður uppsettur ein stjórskermur í høllini, sum verður umleið 5X6 metur. Á stórskerminum verður víst alt tað sum sjónvarpið sendir beinleiðis, og á henda hátt verður gjørligt at síggja allar teir avgerandi bóltarnar í slow-motion ella replay í høllini - ella um bólturin var úti ella inni !!.

– Eisini seinasta ár var tað nakað ljóst í høllini har stórskermurin var, men vónandi fáa vit hetta upp á pláss í ár, soleiðis at hyggjaraviðurskiftini vera betri, sigur Magnus Tausen frá Flogbóltssambandinum.

# Flogbóltur í miðviku

Tveir dystir verða leiktir mikukvøldið í bestu flogbóltsdeildunum.

Hjá kvinnunum tekur KÍF ímóti ÍF, og her er lítið at ivast í, at ÍF hevur ætlanir um at vinna seg nakað upp frá KÍF á stigatalvuni. Ein uppgáva, sum ikki skuldi verið heilt ógjørlig, tó at KÍF helst eisini ætlar at hava sítt orð at siga hesum viðvíðkjandi.

Hjá monnunum vitjar ÍF eisini í Hoyvíkarhøllini, har Fram tekur ímóti. Uttan iva er her talan um dyst, har fuglfirðingar ætla sær avstað við øllum, og sum úrslitini hava verið í ár, so eru so ongar ábendingar um, at tað ikki skal gerast støðan.

Yvirlit yvir dystirnar miku- og hóskvøldið sæst aðra staðni her á síðuni.

## Komandi dystir

**Flogbóltur**

**Meistaradeild kvinnur**

| Dagur | Kl. | Dystur | Dómarar |
|---|---|---|---|
| 04.02 | 20.00 | KÍF-ÍF | Dráttur |
| 05.02 | 20.00 | Fleyr-Mjølnir | Dráttur |

**Meistaradeild menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 04.02 | 20.00 | Fram-ÍF | SÍ |
| 05.02 | 20.00 | Fleyr-Mjølnir | SÍ |

# John Heri í Fremad

**Framd Amager hevur nú fýra føroyingar í leikarahópinumm, og Hjalgrím Elttør hevur skotið sítt fyrsta mál fyri felagið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Danska fyrstudeildarfelagið, Fremad Amager, hevur nú fýra føroyskar leikarar í hópinum.

John Heri Dam, sum seinast leikti í B68, men sum eisini hevur verið í HB og B36, hevur seinastu tíðina vant við felagnum, og nú er so greitt, at hann verður fjórði føroyingurin í leikarahópinum.

John Heri hevur eisini longu leikt fyrsta venjingardystin, og sambært heimasíðu felagsins gekk hetta bara heilt væl. John Heri legði nevnliga upp til fyrsta málið, tá eykaliðið hjá Fremad Amager vann 2-1 á Hørsholm.

Besta liðið hjá Fremad Amager leikti eisini venjingardyst um vikuskiftið. Teir taptu 1-2 fyri Glostrup, men við føroyskum eygum var kanska serliga áhugavert, at málið hjá Fremad Amager varð skotið av Hjalgrím Elttør.



*John Heri Dam er fjórði føroyski leikarin í danska Fremad Amager*